Uttanríkis- og fiskimálaráðið

Dagfesting: 13.05.2026

Uppskot til

Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir botnfiski o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2026
(Fiskiskapur eftir kalva)

§ 1

Í kunngerð nr. 230 frá 30. desember 2025 um veiðu eftir botnfiski o.ø. við fiskiførum undir føroyskum flaggi í NAFO-skipanarøkinum í 2026, sum broytt við kunngerð nr. 31 frá 1. apríl 2026, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftan á § 9 verður sum § 9 a sett:

"Kalvi

§ 9 a. Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu í 2026 fiska í mesta lagi 200 tons av kalva, Atlantic halibut, Hippoglossus hippoglossus, í NAFO-skipanarøkinum. Veiðast skal við línu.
Stk. 2. Heildarkvotan sambært stk. 1 verður latin teimum, sum í 2025 høvdu rætt til egna árskvotu av toski á Flemish Cap ella teimum, sum hesin rættur er fluttur til. Fiskiskapurin verður skipaður sum felagskvota.
Stk. 3. Fiskiskapur eftir kalva sambært stk. 1 kann bert fara fram við fiskifari við veiðiloyvi, sum eftir skrivligari umsókn hevur fingið fiskiloyvi frá Vørn til slíkan fiskiskap.
Stk. 4. Tá heildarkvotan sambært stk. 1 er uppfiskað, kann hjáveiðan av kalva í fiskiskapi eftir toski á Flemish Cap í mesta lagi vera 5%."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og fiskimálaráðið, dagfesting

Bárður á Steig Nielsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen